Skeivar arbei›stí›ir?

Bla›i› tygum júst sita vi› í hondini ver›ur allarhelst seinasta bla›i› undir hesi lei›slu á Yngd. Bla›stjórin á Yngd hevur gjørt av at siga seg úr starvi.

Ikki tí. Sosialurin er eitt óalmindiliga gott arbei›spláss. Ta› er eitt sera spennandi og mennandi pláss at virka í. Men ta› kemur fyri, at tú troyttast av tí arbei›i tú hevur valt og heldur hevur hug at royna okkurt anna›. Hetta er einasta orsøk til, at eg havi valt at fara í fyrsta umgangi.

Men eg má ásanna›, at ta› er vi› blanda›um kenslum, at eg nú sigi farvæl. Ta› hevur veri› bæ›i stuttligt, spennandi, men ikki minst mennandi fyri meg, nú eg havi roynt hetta starvi› í eina tí›.

At skriva tilfar til ungdómin hevur veri› spennandi, men stræví›. Men kortini haldi eg at eg kann siga, eftir at hava roynt meg á hesum øki í ein gó›an mána›, at ta› var ikki akkurát eg at skriva slíkt tilfar. Kanska tí, at hetta tilfar skal ver›a so ólukksáliga forpoppa›, fjas og fjant. Og ta› havi eg ikki hug til at brúka mína d‡rabaru tí› til. Lívi› er eftir mínum tykki ov stutt til slíkt fjas og fjant.

Tí fari eg nú at lata onnur sleppa framat, og vil eg her bert ynskja n‡ggja bla›fólkinum, sum vit í skrivandi løtu ikki vita hvør er, alt ta› besta og gó›an byr› í starvinum.

Haldi tó, eg her havi nøkur gó›rá› til komandi bla›fólki› á Yngd.

1. Minnst til at vera teg sjálvan.
2. Møt altí› til arbei›is til tí›ina. Klokkan 8.00.
3. Vel hóskandi tilfar út. Og í gó›ari tí›.
4. Skriva alt tilfari› í rættiligari gó›ari tí›. Hetta ger, at tú sleppur undan at átaka tær skeivar arbei›stí›ir.
5. Minnst til myndir til greinarnar. Myndirnar eru alney›ugar.
6. Brúka myndamenninar. Teir eru til ta› sama.
7. Minnst til forsí›umynd. Hon er alney›ug. Bla›i› skal jú selja naka›.
8. Hav ta› stuttligt tá tú skrivar.
9. Lat ta› tú skrivar koma frá hjartanum.

Ta› er av alstórum t‡dningi, at trívast í tí vit taka okkum til. Trivna›ur hevur jú alt at siga. Ikki minst í einum arbei›i sum bla›fólk.

Trívist tú ikki í starvinum, er skjótt, at greinarnar gerast hálvhjarta›ar og ke›iligar. Tá er tí›in komin til at siga stopp.

Men ta› slepst ikki undan, at bla›arbei›i er eitt sera spennandi og mennandi arbei›i. Stuttligt, ta› er ta› í øllum førum. Áhugin fyri at skriva er stórur í Føroyum. Eisini hetta merkja vit væl úti á Sosialinum. Ta› eru nógv fólk, sum vísa stóran áhuga fyri arbei›inum sum bla›fólk. Og ta› er bara at frøast um, at áhugin fyri arbei›inum er so stórur sum hann er.

Men uttan at eg skal fara at gera meg betri ella klókari enn nakar annar - og ta› eri eg heldur ikki - so er ikki alt líka gott sum kemur í blø›ini.

Í farnu viku hev›i rithøvundurin Carl Johan Jensen nakrar hugflei›ingar í Dimmalætting. Greinina kalla›i hann "fucking føroyskt". Í greinini kom Carl Johan inn á naka› sera áhugavert. Yvirskriftir í blø›unum. Og fyri ta› ikki skal vera lygn, so sitera›i hann Sosialin. Sosialurin hev›i nevnliga skriva› vi› feitari yvirskrift, at n‡ggja útvarpsrásin Lindin, var farin í luftina. Hvussu hetta so skal skiljast er upp til tann einstaka at taka stø›u til. Men ta› er greitt, at her ber væl til at fáa a›ra fatan, enn hana bla›ma›urin hev›i.

Skjótt er at fara skeivur av hvørjum ø›rum, og skal eg her gera vart vi›, at omanfyri standandi reglur ikki eru skriva›ar til tess at spilla nakran út. Als ikki. Hetta vísir hinvegin, hvussu stuttlig blø›ini eisini kunnu vera.

Fyri at venda okkum til naka› heilt anna›, so hava vit, sum vant, anna› tilfar í bla›num í dag. Í gjár fylti heimsins nógv besti kvinnuligi hondbóltsleikari, Anja Andersen, 31 ár, og í hesum sambandi hava vit ogna› Anju eina heila sí›u. Hendan sí›an má tó metast at vera gullverd at lesa.

Eisini hava vit veri› ein túr uppi í studentarskúlanum í Hoydølum, har vit hava fingi› eitt prát vi› 18 ára gamla studentarskúlanæmingin og fótbóltsleikaran, Ragnar Poulsen.

Føstu tættirnir, sum hitlistar og Svara so, eru sum vant vi› okkum í dag, og fløguummæli kunnu tygum lesa á baksí›uni.

Yngd

Letur eina fløgu um vikuna til teg, sum hevur besta innslagið í Yngd.

Yngd SOSIALURIN

Tí›indabla›i› Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tlf: 311820
Fax: 314720
Teldupostur:
yngd@sosialurin.fo

Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller

Bla›stjórn:
Jákup Bogi Joensen

Uppseting:
Karis Olsen

Yngd er ein partur av Sosialinum mikudag. Evstamark er á middegi friggjadag

Les Yngd í Sosialinum

Hvønn mikudag

Vinn eina fløgu

Nú gevur Yngd tær eisini møguleikan at vinna onkra av nýggjastu fløgunum, sum eru á marknaðinum. Fyri at lesararnir eisini skulu hava høvi at koma fram at, hava vit sjálvsagt rúm fyri einum brævkassa, har lesararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um líkt og ólíkt.

Hevur tú eina yrking, eitt hjartasuff um okkurt, ella ein spurning til Yngd ella okkurt heilt annað, so er bara at finna pennin ella telduna fram, og skriva til okkum. Antin til Sosialurin postboks 76, 110 Tórshavn, merk brævbjálvan „Yngd". Ella send okkum teldupost á yngd@sosialurin.fo

Hvørja viku verður so drigið lut ímillum innkomnu brøvini, og vinnarin fær eina spildurnýggja fløgu sendandi frá 3'aranum í SMS. Fyri at eingin skal smæðast burtur, seta vit onga treyt um at innkomið tilfar verður undirskrivað við fullum navni. Navn og bústaður eiga tó verða upplýst til Yngd, soleiðis at vit vita, hvar ein møgulig fløga skal sendast.

ANJA ANDERSEN

Øll hava vit sað ella hoyrt okkurt um hana. Og øll hava vit okkurt, vit kunnu seta í samband við hana. Um tað so er hennara genialitetur ella hennara atburður. Tað er tó ikki langt av leið, tá sagt verður, at hon var og er heimsins besti kvinnuligi hondbóltsleikari.

Í gjár gjørdist hon 31 ára gamul. Anja Andersen er navnið á víðagitnu kvinnuni.

Nógv hevur verið sagt og skrivað um hana. Men ikki altíð hava ummælini hon hevur fingið, verið av teimum bestu. Og tó. Tað kemur meiri enn so fyri, at síður upp og síður niður við positivum innihaldi standa at lesa í donsku bløðunum um Anju Andersen. Annað vildi verið undarligt. Hon er jú bara so framúrskarandi genial.

Vit á Yngd loyva okkum at endurgeva nakað av tí, sum stóð at lesa í B.T. tann 15. februar í fjar, tá ein av mest umtalaðu persónum í Danmark fylti 30 ár.

Anjas Guldkorn

Vi bliver født som originaler, men de fleste lever som kopier!

Der er blevet sagt så mange ting om personen Anja Andersen. Hvor meget af det der er sandt, er ikke godt at vide. Der findes nok kun én, der er i stand tl at svare på det: MIG.

Fornuft keder mig

Det handler om leg og engagement. Men jeg bliver sgu så ked af det, når jeg kommer ud i klubberne og ser, hvordan de træner, fordi man tager den største værdi ved spillet - legen - væk.

Ordsproget "Tab og vind med samme sind" er det værste, jeg nogensinde har hørt. Jeg er derimod tilhænger af "Du vinder ikke sølv, men taber guld"

Jeg vil hellere være en dårlig taber og en god vinder end at være en dårlig vinder og en god taber.

Tro på dine evner.

Bryd grænser!

Hvis jeg behandler mine spillere ens, så behandler jeg dem ikke ordentligt. De skal behandles forskelligt, netop fordi de ikke er ens.